*Ritstjórnarskifti:*

# At stíga í úrmælingafótaspor

*New editorship:*

## *To step into the footsteps of excellence*

Fróðskaparrit komu út á fyrsta sinni í 1952, og fyrsta ritstjórnin sat leingi. Dorete Bloch hevur hesa lýsing av fyrstu ritstjórnini: Jóannes Rasmussen og Hans Debes Joensen vóru teir, ið løgdu lunnar undir Fróðskaparrit, júst við endamálinum at menna eitt fakmál á føroyskum. Teir vóru treiskir og vóru báðir ritstjórar á teimum fyrstu 25 bókunum. Teirra treiskni kundi væl verið grundin til, at ritið er til enn (Bloch, 2013).

Grundarlagið undir greinini vóru hagtøl, sum Dorete Bloch hevði savnað og skrásett um Fróðskaparrit, og henni líkt, so hevur hon syrgt fyri, at hesi hagtøl eru tøk, soleiðis at møguleiki er at halda fram við




**Mynd 1.** Ritstjórar, sum hava ritstjórnað fleiri enn 10 ritum, litaðir eftir fakøki. Pink er læknafrøði, olivugrønt er jarðfrøði, grønt er mál og bókmentir, blátt er søga og samfelag, og reytt er náttúruvísindi. Dorete Bloch hevur verið høvuðsritstjórin seinastu meira enn 20 árini, saman við Elin Súsannu Jacobsen og øðrum.

Fróðskaparrit 62.. bók 2015: 5-8. - DOI: http://dx.doi.org/10.18602/fsj.v62i0.34



**Fráfarandi ritstjórnin**
***Dorete Bloch (1943-2015)***
Ritstjóri frá 1993-2015
Ritstjórnað rit 41-61 (21 rit) – umframt ískoytisrit
Hesi 21 ritini hava 217 greinar, við 3389 blaðsíðum

hesum skrásetingar- og greiningararbeiði, eisini nú hennara hendur sleptu.

Dorete tók við ritstjórastarvinum á heysti 1993, og beinanvegin legði hon til brots, og fekk ikki minni enn 3 rit givin út í 1994, nevniliga ritið fyri 1993, tað regluliga fyri 1994, umframt serritið um Jóannes í Króki. Í hennara tíð er ritið komið sera regluliga út. Hetta var eisini eitt hon legði seg neyvt eftir, væl vitandi, at reglulig útgáva er ein fortreyt fyri at ritið skal verða virðismett millum granskarar bæði úti í heimi og heima hjá okkum sjálvum.

Hagtølini hjá Doretu vísa eisini, at Fróðskaparrit eru eitt sera gott amboð til samstarv millum føroyskar og útlendskar granskarar, og at hetta hevur vundið nógv uppá seg. Í fyrstuni (rit 1-25) vóru einans 3% av greinunum saman við útlendskum høvundum, meðan tað fyri ritini 26-39 vóru 11% av greinunum, og í tíðarskeiðnum hjá Doretu 13% av greinunum.

Og hetta var eisini ein av høvuðsgrundgevingunum hjá Doretu fyri, hví tað er so umráðandi at varðveita Fróðskaparrit: Flestu greinarnar í Fróðskaparritum eru so grundleggjandi um føroysk viðurskifti, at onnur tíðarrit neyvan høvdu prentað tær



*Elin Súsanna Jacobsen*
Ritstjórnarskrivari frá 1982-94, hjálparritstjóri frá 1997-1999, og ritstjóri frá 2009-2015
Ritstjórnað rit 30-40, 45-47 og 57-61 (16 rit)
Hesi 16 ritini hava 150 greinar, við 2244 blaðsíðum

(Bloch, 2013). Harvið fáa Fróðskaparrit eisini tilboð frá útlendskum granskarum um at prenta greinar, sum snúgva seg um føroysk viðurskifti. Hesir granskarar hava nógvir gjørt kanningar í Føroyum saman við føroyskum granskarum, og hóast nógvar greinar einans hava útlendskar høvundar, so hava hesir høvundar tó í allar flestu førum eitt tætt tilknýti til føroyska granskingarumhvørvið.

Dorete hevur alla tíðina lagt stóran dent á, at ritið skuldi halda tey krøv sum verða sett altjóða tíðarritum, soleiðis at greinar í Fróðskaparritum kunnu javnsetast við greinar í øðrum javnlíkamettum tíðarritum. Hetta hevur sett stór krøv til ritstjórnina, tí ikki hava ymsu høvundarnir altíð skilt týdningin av hesum. Serliga var tað stórt arbeiði at fáa tilvísingarnar gjørdar eftir felags leisti.

Dorete setti seg í ritstjórasessin í eini skiftistíð, har tøknin loyvdi at høvundarnir lótu tekstin inn talgilt. Hetta hevði sínar fyrimunir, men so sanniliga eisini sínar vansar. Eitt var, at tøknin var viðbrekin, men samstundis máttu setast nógv strangari krøv til høvundarnar um hvussu greinin skuldi skrivast. – Og helt Dorete Bloch at treiskni hjá ritstjórnum undan henni høvdu gjørt, at ritinum var lív lagað, so er tað ikki minni galdandi fyri langa tíðarskeiðið, sum Dorete hevur ritstjórnað ritinum, við áhaldni og støðugum arbeiði at tillaga tekstirnar, soleiðis at teir hava ein leist og eitt støði, sum hevur sama støði sum í altjóða javnlíkamettum vísindatíðarritum.

Flestu árini hevur Dorete havt onkran afturat sær í ritstjórnini, og her er Elin Súsanna Jacobsen hon, sum hevur ritstjórnað flestu ritum saman við Doretu. Nøkur rit hevur Dorete tó ritstjórnað

einsamøll sum ritstjóri, nevniliga nr. 49-53 (frá 2001-2005)..

Nú Dorete Bloch sála og Elin Súsanna Jacobsen leggja frá sær, er tað við eyðmýkt at nýggja ritstjórnin tekur yvir. Vit ásanna, at vit taka yvir eitt vælskipað tíðarrit, men eisini, at eins og tá Dorete Bloch tók við fyri meira enn 20 árum síðani, so standa vit aftur í dag í einari broytingartíð, hesuferð eru tað ikki høvundarnir sum skulu arbeiða talgilt, men sjálvt ritið skal talgildast. Vísindalig tíðarrit í dag ferðast víða um heimin í talgildum formi, og nógv av teimum heilt stóru tíðarritunum verða ikki longur prentað, men finnast bert talgild. Hetta eru viðurskifti, sum eisini vit mugu laga okkum eftir.

## Tilvísing

Bloch, D. 2013. Hvussu verður Fróðskaparrit nýtt. Fróðskaparrit 60: 5-9.
DOI: http://dx.doi.org/10.18602/fsj.v60i0.4